# Næststørsta modellskip hansara

**ÍTRIV** Nýggjasta modellskipið hjá Hans Jacob Fuglø í Klaksvík er av skonnartini Sjóborg, og nú er hann farin undir at gera modell av skonnartini Viðoyggin



HANDVERK

*Nógvir arbeiðstímar liggja aftanfyri hvørt einasta skip. Hvussu nógvir, veit Hans Jacob Fuglø ikki talið á*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Randi Jacobsen

Bátasmiðurin Hans Jacob Fuglø gevst ikki so við at gera modellskip.

Herfyri legði hann seinastu hond á modellið av fiskiskonnartini Sjóborg, og hann er longu farin undir næsta verkið. Tað er skonnartin Viðoyggin. Báðar skonnartirnar vórðu í sínari tíð smíðaðar í Danmark.

Sjóborgin er nummar 27 í røðini av modellskipum, sum Hans Jacob Fuglø hevur smíðað.

Tað er ikki til at siga, hvussu nógvar tímar, Hans Jacob Fuglø hevur brúkt upp á Sjóborgina.

– Tímarnar havi eg ongantið skivað niður, og tað er eisini ymist, hvussu nógva tíð eg brúki upp á hvørt skipið. Av og á verður eisini okkurt gjørt umaftur, sigur Hans Jacob Fuglø, sum á sínum modellskipum hevur minst til at hava hvønn einasta smálut við.

Fleiri av modellskipum sínum hevur Hans Jacob Fuglø selt, men enn hevur eingin víst áhuga fyri at keypa Sjóborgina.

**– Eg geri modellskip av áhuga**

– Tíðirnar eru so vánaligar, at eg vænti heldur ikki, at nakar fer at biðja um hana. Modellið av Verdandi, sum eg gjørdi áðrenn hetta, stendur eisini her framvegis, sigur Hans Jacob Fuglø.

Endamálið hjá honum at gera modellskip er tó ikki at selja. Hann ger tað av áhuga, og fyri at eftirtíðin skal fáa at vita, hvussu skip áður sóu út.

Polo er størsta modellskipið, sum Hans Jacob Fuglø hevur smíðað. Sjóborgin tað næststørsta.

Modellið av Sjóborgini er 180 cm frá sprydinum og aftur í hekkuna. Frá borðinum upp í mastratoppin er modellið 117 cm.

### Um Sjóborg

Sjóborg, sum Dorius Hvidbro og tveir brøður hansara lótu smíða í Danmark, kom til Klaksvíkar í 1936.

Dorius Hvidbro førdi hana øll árini.

Undir seinna heimsbardaga flutti Sjóborg ísfisk úr Íslandi til Onglands.

Men sum hjá so nógvum føroysku fiskiskipum í teimum árum, gekk ein dag galið.

13. august 1941, tá ið Sjóborg var á veg úr Íslandi til Ongland og var komin einar 90 fjórðingar úr Nólsoynni, var ein brestur undir bógnum, og alt skipið framman fyri formastina smildraðist sundur.

Tríggir menn spurdust ikki afturíaftur.

Hinir fimm menninir fóru í ein bjargingarbát, og stutt eftir sakk Sjóborg.

Umborð á bátinum var eingin kumpass, men teir miðaðu seg eftir sól, vindi og aldu, og 29 tímar seinni komu teir inn í Sumba. Teir vóru so ókendir, so teir bíðaðu uttanfyri, til sumbingar komu út eftir teimum.

Móttøkan í Sumba var hjartalig. Beinanvegin vórðu menninir leiddir til hús, har teir fingu turr klæðir og mat og drekka. Um náttina gistu teir í Vági, og dagin eftir fóru teir til Havnar

Hildið verður, at ein kavbátur gjørdi enda á Sjóborg.

***Skrivligar keldur:***
Havið og vit I
Stríðsárini 3

*randi@sosialurin.fo*